# zukifelag



Zuzukikonert í Vesturkirkjuni

## Um Suzuki frálæru

Suzuki frálæran eru ein háttur at læra at spæla eitt ljóðføri, sum Dr. Shin'ichi Suzuki menti miðskeiðis í seinastu øld. Frálæran tekur støðið í innlæring av móðurmáli hjá børnum. Flestu børn læra móðurmálið uttan trupulleikar. Suzuki var sannførdur um, at við rættari frálæru, kunnu øll børn læra at spæla eitt ljóðføri.
Í frálæruni verður dentur lagdur á, at børnini byrja tíðliga at spæla ljóðførið. Ljóðføri í barnastøddum verða brúkt. Fyrstu tíðina læra børnini tónleikin av at hoyra hann, heldur enn at lesa nótar.
Børnini spæla nógv í bólkum, og hava javnan framførslur, nógv verður gjørt fyri at tað skal verða stuttligt at spæla tónleik.
Suzuki hátturin snýr seg um samstarv, og um at stuðla hvør øðrum, heldur enn at kappast.
Foreldur eru eisini ein sera stórur partur av frálæruni. Foreldur eiga at luttakað í venjingini, og at fáa innlit í hvussu barnið eigur at venja. Hvønn dag eiga foreldrini at verða saman við barninum, meðan tað venur.



*Tove og Béla saman við einum av ídnu næmingunum*

*Myndir: Jan Müller og Jens K. Vang*

síggja hvat tey sjálvi fara at duga um nøkur ár.

Eingin ivi er um, at tá man upplivir eina so stóra fjøld av gávuríkum ungum fólkum, so kann man bert gleðast um, hvussu væl fyri vit verða við violinleikarum um nøkur ár. Symfoniorkestrini verða í øllum førum væl mannaði.

Føroya Suzukifelag skipar javnan fyri Suzukiskeiðum av hesum slag. Hetta er eisini ein partur av frálæruni. Næmingarnir sleppa at hava tað stuttligt saman og at læra saman. Hetta gevur barninum jaligar upplivingar, sum tað setur í samband við violinina. Hetta mennir hugin og evnini at læra at spæla uppá violin.



*Nógv foreldur høvdu leitað sær í Vesturkirkjuna at hoyra børnini spæla*